

## Edith Mørkøre í Býráðssalinum

Sunnudagin kl. 15 verður listaframsýning við Edith Mørkøre (myndin) í Býráðssalinum við heitinum »SINNIÐ sum NÁTTÚRAN«. Á framsýningini verður abstrakt/ekspresionistiskt list at síggja. Íblásturin til málningarnar hevur hon út frá viðurskiftum, sum rørast í tí dagliga lívinum og hendingum sum hon ella onnur rundan um hana koma út fyri. Náttúran og vøkstur er ein stór inspiratiónskelda hjá Edith og hon heldur at sinni og náttúran hava nógv til felags og renna saman í eina størri eind. Edith arbeiðir við listini sum sítt høvuðsstarv. Hon hevur málað síðan hon var tannáringur og hevur verið við á nógvum ymiskum framsýningum í Føroyum og Danmark.

## Drotningarvitjan í Runavík

Framsýning frá drotningarvitjanini í Runavíkar kommunu verður í Løkshøll. Fyrireikingarnar av eini drotningavitjan eru sera spennandi fyri tey, sum vara av samskipanini og tað ynskja fyrireikararnir at vísa fram: Býurin skal fríðkast, og nógvir borgarar luttaka í arbeiðinum fyri at kunna vísa býin fram á besta hátt. Á framsýningini verður ein myndafrásøgn av vitjanini í Runavík frá byrjan til enda. Víst verður eisini, hvussu nógv varð gjørt burturúr móttøkuni á kajini og á skúlanum, har døgurðin var. Tað er blómuhandilin Orkis á Glyvrum og Navia á Toftum, ið skipa fyri framsýningini.

## Sjósvimjarar leypa á bláman

Sunnudagin 31 oktober kl. 14 er ætlanin at sjósvimjarar úr øllum landinum skulu hittast á Glyvrum.

At svimja á sjónum er nakað føroyingar altíð hava gjørt, tað vit vita um. Tað eru fleiri sum gera tað enn, men nú er tað allarmest fyri vælveru, og fyri fólk ið søkja sær heilsubót.

Nú er ætlanin at taka táttin upp aftur á Mentanarvikuni í Runavík. Tiltakið byrjar kl. 14, við at Torbjørn Jacobsen bjóðar vælkomin. Einki verður kortini sagt, um hann eisini ætlar at leypa á bláman.

### Aldurin einki at siga

Tiltakið er serliga ætla teimum, sum vanliga svimja á sjónum, men øll eru vælkomin.

Aldur hevur einki at siga, men heilsan má verða góð, tí tað eru serliga fólk við høgum blóðtrýsti og hjartasjúkum sum skulu ansa sær við einum ísakøldum sjokki.

Tey, sum koma við bili, verða biðin um at seta bilin niðan fyri koyriskúlan á Glyvrum.

Øll, ið ynskja eitt brúsubað aftaná svimjingina kunnu nýta brúsurnar hjá kappróðrarfelagnum á Glyvrum.

**Nær og hvar:**
Sunnudagin 31. oktober kl. 14 á Glyvrum.



*Kristín Scheving fer at geva av síni vitan um altjóða filmsheimin*

# Ein ferð inn í altjóða filmsheimin

**Kristín Scheving, stjóri á 700IS Reindeerland, er íslendsk og kemur til Runavíkar í sambandi við Mentanarvikuna.**

Runavíkar kommuna samstarvar vanliga við vinarbýir tá serlig tiltøk eru. Hesa ferð vitjar Kristín Scheving sum umboð frá Egilstøðum í Íslandi.

Kristín Scheving arbeiðir innan film, og hevur ferðast víða um við síni framsýning. Fyrstu ferð hon skipaði fyri filmsfestivali var í 2006.

### Víða kend

Týskvøldið 26. oktober bjóðar Kristín Scheving til altjóða filmsfestivalin 700IS Reindeerland, har hon m.a. vísir útvald filmsklipp frá 2010 Filmfestivalinum. Kristín fer at greiða frá um arbeiðið í fyritøkuni 700IS Reindeerland, sum er einasta altjóða fyritøka í Íslandi, sum arbeiðir við eksperimenterandi filmi og video. Tey flestu, sum lesa list á universitetum, arbeiða eisini við hesum hátti at gera film.

Fyri Kristín er eingin ivi um, at filmfestivalurin hevur gjørt Egilstaðir kendar víða um úti í heimi. Tað vísir seg, at fyrispurningar viðvíkjandi festivalinum koma úr øllum heiminum. Í 2010 komu 600 viðmerkingar frá 47 londum um festivalin. Í 2009 gjørdist 700IS Reindeerland eisini partur av eini Europeiskari verkætlan, sum verður nevnd: "Alternativar rutir" og sum er ES fíggjað. Her er ætlanin, at fáa nýggjastu listina og filmarnar í økinum at blíva sjónlig.

Les meira um filmsfestivalin á: www.700.is, Facebook og Twitter.

**Nær og hvar:**
Týskvøldið 26. oktober kl. 20.00 í Løkshøll.